# Viðv. blámusoppi í Kommunuskúlanum

TÍÐINDASKRIV
*Heðin Mortensen*
*borgarstjóri*

Tórshavnar kommuna bað í fjør Teknologisk Institut um at gera eina kanning av hvørt blámusoppur er í Kommunuskúlanum.

**Blámusoppur er ikki akut skaðiligur:**
Nógvar mytur eru tengdar at blámusoppi, og oftast seta fólk blámusopp í samband við álvarsligar bakteriur og sjúkur o.l. Tí er sera umráðandi at skilja millum trúgv og vitan hvat blámusoppi viðvíkur.

Tað skal undirstrikast, at blámusoppur finnst allastaðni í náttúruni og í luftini vit dagliga innanda, og er mest útbreiddur í august-september. Og tað skal eisini undirskrikast, at blámusoppur er ikki vandamikil undir vanligum umstøðum. Føroyingar ið fáa sær ein bita av skerpikjøti, eta eisini tá samstundis blámusopp, sum liggur uttast á skerpikjøtinum.

Tað er eisini vísindaliga staðfest, at blámusoppur viðførir ikki akuttan ampa hjá fólki, men tað eru ávísir bólkar av fólki ið eru serliga viðkvom, og sum sostatt tola minni av blámusoppi enn onnur.

**Blámusoppur ofta blást upp:**
Í Danmark hava tað seinastu minst 20 árini verið afturvendandi og til tíðir sensatiónskend skriving í fjølmiðlum um bygningar við skimmelsvampi. Hetta hevur givið fólki sum heild eina fatan av, at skimmelsvampur er nakað serliga vandamikið, og hetta viðførir oftani ógrundaðan ótta og reaktiónir frá foreldrum og starvsfólkum. Nógv dømi eru úr m.a. Danmark, har bygningseigarar hava reagerað í panik og sett tiltøk í verk sum ikki hava loyst trupulleikarnar, og enntá í vissum førum forverra støðuna.

**Vísindaligar kanningar**
Ongar størri kanningar eru gjørdar í Føroyum av blámusoppi í skúlum, men tað verður granskað nógv aðrastaðni. Í Danmark varð gjørd ein størri kanning sum endaði í 2002.

Granskarar meta, at upp ímóti helvtin av donskum skúlum hava fuktskaðar. Ongin orsøk er at halda at støðan í Føroyum er mundandi annarleiðis enn í Danmark. Fuktskaddir bygningar fáa tó ikki neyðvendigvís trupuleikar við blámusoppi. Tað avhongur í stóran mun av hvat byggitilfar er nýtt. Timbur og tapet geva størst risiko fyri vøkstri av skimmelsvampi, meðan tað krevst sera stór fuktigheit fyri at skimmelsvampur kann vaksa á betongi og pussi.

Kommunuskúlin er í høvuðsheitum ein betongbygningur.

Granskarar hava eisini ávíst, at skimmelsvampur er vanliga bert ein av fleiri faktorum sum hava týdning fyri um starvsfólk ella næmingar í skúlum hava ampa av høvuðpínu, turrar slímhindur og manglandi konsentratión. Á skúlum eru vanliga nógv fólk savnaði, og persónsbelastningur er ein týðandi orsøk til slíkar ampar. Granskarar hava víst á, at fólk við astma, hoyfepur, psykososialum trupulleikum, t.d. um ein næmingur verður happaður, hava størri risiko fyri høvuðpínu, turrum slímhindum og manglandi konsentratión, enn at uppihalda sær í einum bygningi við skimmelsvampi.

Danska kanningin frá 2002 staðfesti eisini, at samanhangur er millum blámusopp, og irritatión av eygum og andingarleiðum o.a., men samanhangurin var rættuliga veikur. Kanningin vísti nevnliga tað óvæntaða úrslitið, at tað vóru ikki fleiri fólk við inniklimasymptomum í skúlum har ógvusligur vøkstur av blámusoppi var staðfestur, enn á skúlum uttan blámusopp. Og tað vóru heldur ikki fleiri við veruligum allergiskum reaktiónum á skúlunum við nógvum vøkstri av blámusoppi.

**Kanningin av Kommunuskúlanum:**
Kanningin hjá Teknologisk Institut staðfesti, at í 2 av 20 royndum var støði av blámusoppi omanfyri vegleiðandi markvirðir, og var hetta í einum gongsøkið. Blámusoppur var ikki staðfestur omanfyri vegleiðandi markvirðir í klassastovum og lærarastovu, ella øðrum rúmum har fólk uppihalda sær í longri tíð í senn.

Umsitingin hjá kommununi fór síðani undir at meta um innihaldið í frágreiðingini, fyri at takað støðu til um úrslitini góvu orsøk til at gera inntriv beinanvegin, og um vandi var fyri at blámusoppurin fór at nørast meira.

Niðurstøðan av hesi meting var:

- At blámusoppavøkstur í rúmum har fólk uppihalda sær í longri tíð var **ikki** á einum støði sum viðførir ampa fyri vanliga fólk.
- At tey tvey sløgini av blámusoppum sum vanliga geva orsøk til ampar vóru í tí eina førinum ikki staðfestir og í hinum førinum staðfestir í nøgdum **niðanfyri vegleiðandi markvirðir**.
- At fortreytirnar fyri at blámusoppurin kann nørast eru **ikki** til staðar, við tað at relativa fuktin í rúmunum har fólk uppihalda sær í longri tíð, er munandi undir fuktmarkinum fyri nær blámusoppur kann nørast.

**Handlingsætlan:**
Út frá metingini hjá umsitingini av frágreiðingini frá Teknologisk Institut varð semja um hesa handlingsætlan:

1. Næmingurin við serligari lungnasjúku, sum var orsøk til at kanningin var gjørd, skuldi flytast í fyribils skúlastovurnar so skjótt hesar vóru klárar.
2. Lærarastovan og umsiting skuldi flytast í Gamla Realskúlan, sum tá var undir innrætting til fyrisitingarbygning, so skjótt hølini har vóru klár at takað í nýtslu
3. Eitt vindeyga skuldi skiftast í tónleikastovuni
4. Bráfeingis reinsing og ábøtur skuldu gerast í gongini har mesti blámusoppurin var staðfestur, tá lærararnir vóru fluttir oman í Gamla Realskúlan
5. Orsøk var ikki at broyta arbeiðssetningin hjá arkitektinum viðvíkjandi heildarætlanini fyri Kommunuskúlan, sum skal halda fram eftir upprunaliga ætlaða leistinum, og skal fyriliggja 1. apríl 2008. Raðfestingin av hvørjir partar av skúlanum skulu umvælast fyrst, skal m.a. takað støði í frágreiðingini frá Teknologisk Insitut

**Kunning:**
Við støði í, at kommunan ikki hevur fingið aðrar fráboðanir um ampar av inniklimanum í Kommunuskúlanum enn í samband við henda eina næmingin sum hevur eina lungjasjúku, og at ein loysn var funnin fyri hansara viðkomandi, var ikki mett at frágreiðingin hjá Teknologisk Institut týddi uppá ein so umfatandi trupulleika, at neyðugt var við almennari kunning um málið.

Men nú hava skúlaleiðsla og trygdarumboð úttalað seg um málið, og hava ført fram at talan er um álvarsligan heilsuvanda, uttan at hava fakliga førleikan at meta um tað. Teir hava sostatt gjørt júst tað sum so øgiliga nógv dømir eru um úr útlandinum – nevnliga at dyrkað myturnar um blámusopp, og hava teir harvið loypt ógrundaðan ótta á næmingar, foreldur og starvsfólk.

Tí hevur kommunan avgjørt at senda hetta kunningarskriv út.

# Genialir slóðbrótarar



FRANK DAVIDSEN

Um ikki Hugo Fjørðoy og Lars Larsen fyri skjótt hálvari øld síðani av sínum eintingum við einum ótroyttiligum vilja og undir umstøðum sum eingin í dag kann ímynda sær, fingu sett á stovn flogvegis samband við útheimin, høvdu Føroyar helst ongan flogvøll havt í dag.

Eins og nú so var mótstøðan ír miðøkinum og alt varð gjørt, til at forða hesum báðum slóðbrótarum í at fáa framt teirra ætlan um flogvegis samband við meginlandið. Teirra hugflog var jú eina hálva øld fremri enn teirra mótstøðumenn tá, eins og teimum, sum nú rópa upp um »ein altjóða flogvøll«.

Í hesa skjótt hálvu øldina hevur Vága floghavn verið ein mega faktorur, ið hevur flutt okkara samfelag frá »Tjaldurstíðini« fram til eitt ta mest framkomna landið í heiminum.

Hvar hevði okkara samfelag staðið í dag, um vit ikki hesa tíðina høvdu havt ein vælriknan flogvøll.

Ein hevur loyvi at hugleiða, men eingin ivi er um, at mangt hevði verið øðrvísi, og vóru tað ikki tveir genialir sørvingar við hugflogið, so hevdu Havnaborgarar kanska enn í dag staðið úti á Molanum og tikið ímóti ferðandi av Tjaldrinum.

# Er trúvirðið hjá Javnaðarflokkinum í lagi?

INGEBORG VINTHER



Helena Dam á Neystabø var í nógv ár ein av trúgvu stuðlunum hjá Javnaðarflokkinum.

Brádliga skifti hon flokk, og meldaði seg í Sjálvstýrisflokkin, og tíðindini søgdu, at orsøkin var, at Javnaðarflokkurin ikki vildi stilla upp ein av teimum persónum, sum Helena ynskti at fáa á javnaðarlistan.

Sum landsstýriskvinna í sjálvstýrissamgonguni var Helena sera íðin eftir at fáa avtalu við donsku stjórnina um loysing eftir eitt ávíst áramál, og hon var við til fundir í Keypmannahavn, har hon var ein av fremstu talskvinnunum fyri einum politikki, sum liggur rættuliga langt frá tí sum higartil hevur verið javnaðarpolitikkur, tá talan er um spurningin um samband ella loysing. Tí hevur ein eisini hug at spyrja, hvar stendur Javnaðarflokkurin í hesum spurninginum í dag? tá loysingarfólk stilla upp fyri flokkin.

Kann ein politikari við hugsjónum skifta flokk alt eftir, hvar viðkomandi væntar at hava frægast møguleika at verða valdur?

Tað man helst undra mangan veljara, at ein politikari eitt valskeið kann standa og argumentera fyri politikinum hjá Sjálvstýrisflokkinum, og so fá ár seinni kann stilla upp og argumentera fyri Javnaðarfloksins politikki.

Hvar eru veruligu politisku hugsjónirnar hjá einum politikara, sum kann skifta politikk alt eftir, hvar viðkomandi sleppur á vallistan?

Tað er freistandi at halda, at ein slíkur politikari ikki hevur nakrar veruligar politiskar hugsjónir, men heldur letur seg stýra av øðrum áhugamálum, sum ikki hevur nógv við grundleggjandi hugsjónir at gera.

Kann Javnaðarflokkurin góðtaka at hava valevni, sum ikki tykjast veruliga at taka undir við javnaðarhugsjónunum?

Vit eru helst nógv sum eisini undrast yvir, at Javnaðarflokkurin nú tykist verða so rúmligur, at øll sum kunnu savna nakrar atkvøður kunnu sleppa á vallistan, hóast hesi valevni fyri stuttari tíð síðan hava verið millum fremstu umboðini fyri aðrar flokkar, sum avgjørt ikki standa fyri teimum grund-leggjandi javnaðarsjónarmiðum, sum nógvir javnaðarveljarar framvegis meta sum fremsta verjan fyri áhugamálunum hjá vanliga føroyska løntakaranum og ikki minst teimum eldru og veiku í samfelag okkara.

Vit síggja at fyrrverandi framstandandi sambandsfólk og sjálvstýrisfólk standa sum valevni hjá Javnaðarflokkinum, og eingin í flokkinum tykist at seta spurnartekin við um hesi valevni kunnu umboða veruligu javnaðarhugsjónirnar.

Javnaðarflokkurin kann missa meira enn flokkurin vinnur við at loyva einum og hvørjum at stilla upp sum valevni fyri flokkin.

Helst er tað soleiðis, at hesi umboð fyri Sambandsflokkin og Sjálvstýrisflokkin kunnu draga nakra atkvøður til Javnaðarflokkin.

Hinvegin eru tað mong, sum hava ilt við at velja ein flokk, sum sigur seg umboða javnaðarhugsjónina, men sum kortini stillar upp valevni, sum antin onga politiska hugsjón hava ella umboða eina politiska hugsjón, sum liggur rættuliga langt frá javnaðarhugsjónini.

Tað kann væl fara at verða soleiðis, at Javnaðarflokkurin fer at missa eitt rættuliga stórt tal av trúgvu veljarum sínum, og so er lítið vunnið, hóast hesi nýggju valevnini frá Sambandsflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum, møguliga kunnu skaffa Javnaðarflokkinum nakrar atkvøður afturat.

Undir øllum umstøðum er vandi fyri at gamla javnaðarhugsjónin, sum eitt stórt tal av okkara løntakarum hava stuðlað, fer at hvørva, nú valevni frá øðrum flokkum og við øðrum hugsjónum fáa fría atgongd til at stilla upp fyri Javnaðarflokkin. Eisini er vandi fyri, at flokkurin fer at missa trúvirði sítt, um eitt hvørt valevni, uttan mun til politiska hugsjón, sleppur at stilla upp fyri flokkin.